## Íslendingar selja

Íslendska felagið GPG umhugsar at selja tey fýra fiskavirkini, sum felagið eigur í Noregi. Talan er um trý virkir á Vannøya í Troms og eitt í Karmøyvær við Nordkapp. Íslendingar yvirtóku virkini fyri trimum árum síðani og ætlaðu at vinna pengar burtur úr at arbeiða saltfisk. Men tað hevur ikki gingið eftir ætlan, og í fjør gav raksturin 12 mió. krónur í halli. Sambært Fiskeribladet hevur Aker Seafood hjá Kjell Inge Røkke áhuga í virkjunum.

## Trolaðu eftir laksi

Síðani tann 1. oktober hava norskir veiðimenn havt loyvi at royna eftir laksi, sum er sloppin úr aliringum, og higartil eru umleið 30 prosent av tí slopna laksinum fingin aftur. Sum eina roynd hevur Havrannsóknarstovan í ár roynt at trola eftir slopnum laksi. Hetta bleiv gjørt við einum serligum troli, men royndin eydnaðist ikki serliga væl. Hildið verður, at laksurin stendur ov nær landi, til at tað ber til at fáa hann við troli.

# Reglugerðir fyribyrgja happing



*Tórshavnar kommuna hevur gjørt eina kantinu í Posthúskjallaranum, fyri at savna mongu starvsfólkini ið starvast í miðbýnum.*

**Í Tórshavnar kommunu starvast meir enn 1300 fólk, kommunan hevur reglugerðir sum skulu fyribyrgja happing og kynsligan ágang á arbeiðsplássunum**

TRIVNAÐUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Kommunan hevur klárar reglugerðir um til dømis arbeiðstíðir, førleikamenning og royking. Í oktober komu tvær nýggjar reglugerðir, sum eru um kynsligan ágang og happing á arbeiðsplássunum.


*Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn*

- Tað sum tað gongur út uppá, er at reglugerðirnar skulu vera fyribyrging á økinum. Eg vil ikki siga, at vit hava happing á arbeiðsplássinum, men man hoyrir nógv um tað, tað kann til dømis vera á barnagørðum og skúlum, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

- Fyri at fyribyrgja hesi tingini og at vegleiða hava vit gjørt eina reglugerð, sum sigur, at á arbeiðsplássunum hjá Tórshavnar kommunu, vilja vit ikki hava, at happing gongur fyri seg.

### Savna starvsfólkini

Fyri at savna nøkur av teimum mongu starvsfólkunum, lat kommunan fyri einum ári síðan eina kantinu upp í Posthúskjallaranum. Har kunnu øll starvsfólk hjá kommununi møtast at eta um morgunin og á middegi. Tey flestu, ið nýta kantinuna, starvast í miðbýnum, til dømis fólk á margarinfabrikkini, býarbókasavninum, tannlæknastovuni og fyrisitingini.

- Kantinan er eitt savningspunkt fyri starvsfólkini, sum í arbeiðinum eru spjadd í nógvar bygningar, sigur Heðin Mortensen.

- Vit hava fingið stak góðar reaktiónir frá starvsfólkunum, og hetta hevur eisini haft ávirkan á heilsuna, tí fólk fáa sunnan mat har.

### Samrøður

Komandi ár fer kommunan undir at hava starvsfólkasamrøður, ætlanin er, at tær skulu vera á hvørjum ári. Har skulu starvsfólkini tosa við sín egna leiðara, um hvat tey eru nøgd og ónøgd við, og hvørjar ætlanir tey hava í sínum starvi.

- Vit ætla at ganga starvsfólkinum á møti so vítt tað er møguligt. Eg haldi at tað hevur stóra ávirkan á trivnaðin, at starvsfólkini vera hoyrd, sigur Heðin Mortensen.

- Eg haldi, at tað sum skapar trivnað, er, at man følir seg væl, tá man fer til arbeiðis, og at man er millum starvsfólk, sum eru blíð, fyrikomandi og hjálpsom. Tað hevur nógv at siga og tað ger, at tú ært nógv burturúr arbeiðsdegnum, sigur Heðin Mortensen.

# Umstøðurnar mest týdning

**- Tað hevur nógv at siga, at starvsfólkini trívast. Um starvsfólkini eru óuppløgd, tá kundarnir koma inn, so verður ein ikki valdur til ársins handil, sigur Elsebeth Andreasen, sum eigur Idé Møblar**


*Birgir Andreasen og Elsebeth, eigarar av Idé Møblum*

TRIVNAÐUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Fyrsta málið hjá Idé Møblum er, at starvsfólkið skal trívast, og at kundarnir fáa tað teimum tørvar.

- Tað fyrsta sum skal til, fyri at fáa tað at virka, er at arbeiðsumstøðurnar eru í lagi. Vit hava arbeitt miðvíst ímóti at fáa góð og hóskandi hølisviðurskifti, sigur Elsebeth Andreasen, sum saman við manninum Birgir Andreasen eigur og rekur Idé Møblar.

### Lata upp seinni leygardag

Tá Idé Møblar hava lagt sínar upplatingartíðir, hava tey eisini hugsað um starvsfólkini.

Handilin plagdi at vera opin til kl. 19 fríggjakvøld og lata upp aftur kl. 9 leygarmorgun. Hesar tíðirnar eru nú broyttar soleiðis, at handilin letur aftur ein tíma fyrr fríggjakvøld og letur upp ein tíma seinni leygarmorgun.

- Tað merkir rættiliga nógv fyri starvsfólkið, at tey hava ein tíma eyka leygarmorgun, so hava tey møguleika at hugna sær eitt sindur saman við familjuni, áðrenn tey fara til arbeiðis, greiðir Elsebeth Andreasen frá.

Síðsta sunnudag áðrenn jól hava handlarnir loyvi at hava opið, men í mong ár hava Idé Møblar valt at hava stongt henda sunnudag.

- Tað er bæði fyri okkum og fyri starvsfólkið. Vit halda, at tað er nóg leingi opið til jóla. Tann sunnudagin plaga vit at fara á Hotel Hafnia at hugna okkum. Meðan flestir aðrir handlar hava opið, hava vit okkara jólahald fyri starvsfólkum við maka og børnum.

### Ársins handil

Idé Møblar hava útferðir fyri starvsfólkinum á hvørjum ári. Tey síðstu árini tá tey hava verið kosin Ársins handil, hava tey verið uttanlands og ferðast.

- Eg haldi, at tað ávirkar samanhaldið, at vit hava møguleika at vera saman undir øðrum umstøðum enn til dagligt, sigur Elsebeth Andreasen.

Idé Møblar hava fýra ferðir á rað fingið heiðurin Ársins handil, har tað eru kundarnir, ið avgera, hvør besti handilin er.

- Um starvsfólkini ikki trívast, so høvdu vit ikki vunnið. Um starvsfólkini eru óuppløgd, tá kundarnir koma inn, so verður ein ikki valdur til Ársins handil. Tað hevur nógv at siga, at starvsfólkini trívast. Tað sæst eisini aftur, við at vit ikki skifta starvsfólk ofta, onkur hevur verið her í 27 ár, sigur Elsebeth Andreasen.


*Idé Møblar hava fleiri ferðir bjóða starvsfólkinum út at ferðast. Her eru tey á veg til Danmarkar í mai 2005*